# Náttúran á motorsúklu





*Johnny Joensen (fremst) og bróðurin Agnar (næstur honum og nr. Tvey frá vinstru) hava tikið stig til eina øðrvísi náttúruuppliving*

**At uppliva náttúruna skal verða bæði spennandi og stuttligt, og haraftrat fer nú at bera til at fáa alt hetta uttan at fáa sveittan í barm**

FERÐAVINNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Birgir Waag Høgnesen*

Tað er ein gamal sannleiki, at Føroyar skulu ikki selja seg sjálvar sum ferðaland upp á tað góða veðrið. Vit skulu selja okkum upp á upplivingar, náttúruna og – heldur onkur – enntá regnið.

Tveir brøður í Vestmanna fara nú at bróta burtur úr nýggjum, tá tað ræður um at selja upplivingar til ferðafólk. Talan verður nevniliga um eina samanrenning av upplivilsi og náttúru.

Talan er um brøðurnar Johnny og Agnar Joensen, sum hava fingið tað hugskot, at bjóða áhugaðum náttúruupplivingar á fýrahjólaðum motorsúklum.

Talan er um tær sonevndu ATV (All Terraine Vehicle) motorsúklurnar. Hesar eru vorðnar alt meiri vanligar í Føroyum, og eru serstakliga væl egnaða at koyra í bøi og haga við – allastaðni, har tað er trupult ella vónleyst at koyra við vanligum akførum.

- Hugskotið kom bara. Eg havi havt eina slíka motorsúklu í eina tíð nú, og havi koyrt rættiliga nógv í haganum. Eg plagi at hjálpa einum bónda í einum av hagapørtunum, og tá so hugskotið kom, fekk eg eina avtalu í lag við hann, um at sleppa at koyra í haganum við ferðafólki og áhugaðum føroyingum annars, sigur Johnny Joensen.

## Órógvar ikki

Johnny og Agnar hava rættiliga gjørt seg út til hesa spennandi avbjóðingina, og í síðstu viku komu so tíggju ATV motorsúklur til landið, sum teir báðir skulu nýta til virksemi sítt.

Teir eru sjálvsagt greiðir yvir, at ligið er so langt út á árið nú, at tað ikki verður tað stóra virksemi í summar. Men við at fáa motorsúklurnar til landið nú, hava teir góða tíð at fyrireika seg til komandi ár.

- Sum sagt havi eg sjálvur koyrt rættiliga nógv í haganum, og vit hava sum er lagt okkum á tvær ymiskar rutur. Onnur er minni krevjandi og koyrt verður fyri tað mestga á grúsvegi. Hendan rutan gongur niðan